# Árni minkar um sítt reiðaravirksemi

**Árni M. Dam á Norðskála er ikki longur reiðari á Thomasi Nygaard og Fugltúgvuni, men felagið hjá honum, P/F Jómar, eigur og rekur framvegis línubátin, Kúrberg**



*Árni M. Dam minkar um sítt reiðaravirksemi. Svágurin, Dánjal Jákup Vilhelm, yvirtekur nú virksemið hjá Thomasi Nygaard og Fugltúgvuni, men Árni rekur framvegis línubátin, Kúrberg, sum felagið hjá honum, P/F Jómar, eigur*

REIÐARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*

Seinastu árini hevur Árni M. Dam á Norðskála verið reiðari á línuskipunum, Thomasi Nygaard og Fugltúgvuni. Hann var eisini reiðari og ein av eigarunum av línubátinum, Sigmundi, fyrrverandi Vaðhorn, sum hann fyrr í ár seldi P/F Eysturoy á Toftum. Tað var P/F Jómar, sum átti Sigmund. Felagið eigur og rekur framvegis línubátin, Kúrberg, sum eisini hevur snelluloyvi. Árni er tískil framvegis reiðari á Kúrbergi.

Tað er felagið, P/F Line-Fish, sum eigur Thomas Nygaard og P/F Torvanes, sum eigur Fugltúgvuna.

### Svágur tekur yvir

Frá umleið hálvum november í ár, hevur svágur Árna M. Dam, havnamaðurin, Dánjal Jákup Vilhelm, sum býr í Leynum, tikið yvir reiðaravirksemið hjá Thomasi Nygaard og Fugltúgvuni, sum Árni hevur havt um hendi.

Skrivstovan er framvegis í hølunum hjá P/F Jómar á bryggjuni á Norðskála.

Men Árni hevur ikki bara verið reiðari; hann hevur eisini verið formaður í Felagnum Línuskip í fleiri ár. Nú hann minkar um reiðaravirksemið, og svágurin yvirtekur tann størra partin, hevur Árni ynskt ikki at vera formaður í felagnum hjá línuskipum meira. Felagið hevði fund á Runavíkar Sjómansheimi sunnudagin, og tá varð annar formaður valdur.

Sum tann skilamaður, Árni er, hevur hann eisini sitið í nevndum, sum hava ráðgivið um fiskiveiðina undir Føroyum.

Nýggi reiðarin á Thomasi Nygaard og Fugltúgvuni, Dánjal Jákup Vilhelm, hevur átikið sær hetta starv í fyribils eitt hálvt ár.

### Besta árið nakrantíð

Tað er eingin loyna, at árið 2002 ivaleyst er besta árið hjá okkara línuskipum nakrantíð. Fiskiskapurin hevur verið óføra góður, og hóast prísirnir hava verið lækkandi, eru nøgdirnar so mikið stórar, at árið 2002 fyribils fer í søguna sum tað, ið royndist best.

Nú árið er runnið, er Sigmundur besti línubátur í flotanum.

Skipari á Sigmundi, er eiðismaðurin og rokskiparin, Mortan Mortensen.

# Einki at tjena, tá ið flotin liggur

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*

Vanliga eru ikki nógv ísfiskaskip úti millum jól og nýggjárs, men so skjótt nýggjárshøgtíðin er farin aftur um, loysa øll tey skip, sum liggja klár at fara. Einstøk skip plaga tó at ríva manningina upp úr bleytu stovustólunum beint eftir jól og gera ein stuttan túr millum høgtíðirnar, men hetta eru tey allar fægstu.

Hesaferð verður tó eingin slíkur túrur gjørdur, tí Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur lýst verkfall eftir, at samráðingarnar við reiðararnar slitnaðu, 18. desember. Men hesar samráðingar komu heldur ongantíð í gongd, tí partarnir kundu ikki semjast um samráðingargrundarlagið.

Og tá er ikki nógv at gera...

### Eingin fiskur

Tá ið skipini plagdu at fara útaftur beint eftir nýggjár, kundi roknast við, at gongd kom á flakavirkisvinnuna einar 10-14 dagar inn í nýggja árið. Men soleiðis verður eftir øllum at døma ikki í ár.

Eingin veit, hvussu drúgt verkfallið kann gerast, men óhugsandi er ikki, at tað verður ein tungur burður hjá semingsmonnunum, Høgna Høgnesen og Suna S. Jacobsen, at fáa semju millum partarnar.

Tey, sum starvast á fiskavirkjunum kring landið, kunnu tí ikki rokna við at sleppa til arbeiðis aftur, fyrr enn í øllum førum nakrir dagar eru farnir av nýggja árinum, 2003.

Útróðrarflotin er tó ikki raktur av verkfallinum, men hóast útróðurin hevur verið góður í vetur, er avmarkað, hvussu nógvan fisk hesin parturin av flotanum kann føra til lands.

Sum er, verða gólvini á flestu fiskavirkjum turr eina tíð frameftir - og eingin peningur verður at tjena hjá teimum, sum vinna sítt lívibreyð á virkjunum kring landið.

# Einki samband millum verkfalspartarnar

**Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, væntar, at hetta verður eitt tungt stríð, nú partarnir enn ikki eru samdir um sjálvt samráðingargrundarlagið.
- Hetta er ógvuliga beklagiligt, sigur hann**

*- Støðan er ógvuliga beklagilig, men vit noyðast at ásanna, at rættiliga langt er millum partarnar, sigur Jákup Sólstein*



SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*

Enn røkist einki fyri nakrari semju millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag, soleiðis at skipini kunnu fara útaftur, tá ið jóla- og nýggjárshalgan er farin aftur um.

Formaðurin í reiðarafelagnum, Jákup Sólstein, sigur, at einki samband hevur verið millum partarnar, síðan samráðingarnar slitnaðu, og tí eru heldur eingi útlit fyri nakrari loysn, soleiðis sum støðan er.

### Einki samband

- Einki samband hevur verið millum partarnar, og eingin nýggjur fundur er avtalaður, sigur hann.

Spurdur, um hann væntar, at hetta verður eitt tungt stríð, nú partarnir enn ikki eru samdir um sjálvt samráðingargrundarlagið, ásannar Jákup, at tað verður tað helst.

- Hetta er ógvuliga beklagiligt, men vit noyðast at ásanna, at rættiliga langt er millum partarnar.

Formaðurin í reiðarafelagnum sigur, at tað, sum brennur heitast, er, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag vil hækka yvirmannapartarnar, men tað kemur ikki uppá tal.

- Tað er heldur soleiðis, at onkrir yvirmannapartar eiga at lækka, sigur Jákup Sólstein.

### Ikki rætt

Ellintur M. Abrahamsen hevur sagt, at hini manningarfeløgini góðtóku at broyta undirskrivaða sáttmálan eftir seinastu samráðingar, tí hesi feløg hava ikki yvirmannapartar eins og Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

- Men hetta er ikki rætt, sigur Jákup Sólstein, tí øll hini trý feløgini, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Motorpassarafelag og Maskinmeistarafelagið hava eisini yvirmannapartar - um enn í minni mun enn FSN. Kortini gingu tey við til at rætta tær villur og teir skrivifeilir, sum vóru, tá ið seinasti sáttmálin varð undirskrivaður í januar 1999.

Semingsmenn í trætuni millum felagið hjá skiparum og navigatørum og reiðarafelagið, eru Høgni Høgnesen og Suni S. Jacobsen.

Reiðarafelagið er eisini í samráðingum við Maskinmeistarafelagið, men hesar samráðingar eru fyribils útsettar til fyrst í komandi ári. Sáttmálin við Maskinmeistarafelagið gekk eisini út, 1. desember.

Føroya Motorpassarafelag hevur ikki sagt sáttmálan við reiðararnar upp, og Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag gjørdu nýggjan sáttmála í summar.





# Gamli Gullfinnur aftur í flotan

*Avloysarin hjá Jón Sigurðsson. Talan er um fyrrverandi Gullfinnur, ið nú ber navnið Storeknut. Skipið lastar umleið tað dupulta, ella 2000 tons, sammett við Jón Sigurðsson, og hevur harumframt væl størri maskinorku.*

**Nótaskipið Jón Sigurðsson er seldur til Norra, og í hansara stað kemur ein gamal kenningur aftur í flotan. Reiðaríið hjá Jón Sigurðsson hevur útvegað sær fyrrverandi Gullfinn, ið nú eitur Storeknut, úr Norra.**

ENDURNÝGGJAN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

– Skulu vit vera við, so mugu vit eisini fylgja við. Tað sigur Anfinn Olsen, reiðari, eftir at nótaskipið Jón Sigurðsson nú er selt til Norra. Í staðin fyri hevur reiðaríið útvegað sær eitt væl størri skip, somuleiðis úr Norra. Talan er um fyrrverandi Gullfinnur, bygdur í 1979, og sum var í føroyska flotanum í áttatiárunum. Skipið hoyrir í dag heima í Norra, og ber navnið Storeknut.

Hóast Storeknut bara er eitt ár nýggjari enn Jón Sigurðsson, ið er bygdur í 1978, so er talan um eitt væl betri skip, sigur Anfinn Olsen. Skipið varð høvuðsumvælt í 1991, og fekk tá millum annað nýggjan motor.

### Størri orka

Sammett við Jón Sigurðsson er tað eitt væl størri skip, ið kemur í flotan í næstum. Meðan Jón Sigurðsson lastar 900 tons, tekur Storeknut meira enn tað dupulta, ella umleið 2000 tons. Eisini hevur skipið væl størri maskinorku, 4900 hestar, sammett við Jón Sigurðsson, ið hevur 3300 hesta maskinorku.

Anfinn Olsen vísir á, at umstøðurnar vera munandi betri við nýggja skipinum.

– Av tí at skipið lastar so nógv, ber til at spara nógva siglingstíð aftur og fram av feltinum, og eisini kann tað loysa seg at sigla longri eftir góðum prísi, sigur Anfinn Olsen. Harumframt orkar Storeknut munandi betur at toga, tá roynt verður við troli.

Eins og Jón Sigurðsson kann Storeknut royna bæði við nót og við troli. Nýggja skipið fær øll loyvi hjá Jón Sigurðsson, og kann tí bæði fiska sild, makrel, lodnu, og fær somuleiðis burturav føroysku svartkjaftakvotuni.

### Væl dýrari

Í roknskapinum hjá reiðaríinum E.M. Shipping, ið higartil hevur átt Jón Sigurðsson er virðið á skipinum mett til góðar 31 milliónir krónur. Sjálvur hevur reiðarin lítlan hug at tosa um sølu- og keypsprís, men hann sigur tó so mikið, at søluprísurin liggur niðanfyri hetta virði.

Anfinn Olsen vísir á, at prísurin á lítlum og gomlum nótaskipum sum heild er lágur í løtuni, og kemst hetta av, at flestu ynskja nýggjari og størri skip. Tí eru nógv smærri nótaskip á marknaðinum í dag, meðan keypararnir eru fáir.

Reiðarin hevur eisini lítlan hug at siga nakað um kostnaðin á nýggja skipinum. Men talan er um eitt væl dýrari skip enn Jón Sigurðsson, sigur Anfinn Olsen.

Tað er íslendska felagið Samherji, ið stendur aftanfyri smápartafelagið E.M. Shipping og somuleiðis Jón Sigurðsson, ið nú er seldur. Og nú reiðaríið útvegar sær annað og størri skip, eru tað somu eigarar, ið standa aftanfyri. Anfinn Olsen sigur, at talan verður ikki um at aðrir íleggjarar skulu uppí.

Seinnu árini hava verið góð hjá nótaskipunum. Í fjør hevði reiðaríið hjá Jón Sigurðsson góðar níggju milliónir krónur í yvirskoti, og sjálvt um árið í ár ikki hevur verið eins gott og í fjør, so hevur 2002 eisini hilnast væl, sigur Anfinn Olsen. Hann hevur tí vónir um, at nýggja skipið fer at bera seg.

Í næstum koma norðmenn til Føroya eftir Jón Sigurðsson, og Anfinn Olsen væntar, at nýggja skipið kemur hendavegin í februar mánað.

### Góðkenning úr Fiskimálaráðnum

Hóast allir smálutir í samband við keypið av Storeknud ikki eru komnir uppá pláss enn, so hevur reiðaríið fingið játtan úr Fiskimálaráðnum uppá, at eingir trupulleikar eru við at fáa nýggja skipið inn í flotan í staðin fyri Jón Sigurðsson. Hetta váttar Andras Kristiansen, deildarstjóri í Fiskimálaráðnum.

Reglurnar siga, at Fiskimálaráðið skal geva innflutningsloyvi til øll fiskiskip, sum koma til landið. Andras Kristiansen sigur, at Fiskimálaráðið hevur sent reiðarínum hjá Jón Sigurðsson eitt játtandi skriv um, at eingir trupulleikar eru við at fáa innflutningsloyvi til Storeknut. Og sjálvt um endaliga innflutningsloyvi ikki er skrivað enn, so skuldu eingir trupulleikar verið í hesum sambandi, sigur Andrass Christiansen.



*Nótaskipið Jón Sigurðsson er nú selt til Norra.*

# Strandferðslan gjørt avtalu um koyring í Suðuroynni

**Strandferðslan hevur skrivað undir sáttmála við Sp/f Suðuroyar Bygdaleiðir um at røkja alla koyring í Suðuroynni, næstu fimm árini. Nú er bara flogleiðin eftir at bjóða út**

SAMFERÐSLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Eftir drúgva fyrireiking og samráðingar aftur og fram eydnaðist loksins Strandferðsluni at gera avtalu við privatar um koyringina hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni.

Avtala er gjørd við Sp/f Suðuroyar Bygdaleiðir um at røkja koyringina í allari oynni. Hetta hóast koyringin varð boðin út í tveimum, í norðara og sunnara parti av Suðuroynni. Strandferðslan fekk fýra tilboð uppá koyringina í norðara partin og trý tilboð uppá koyringina í sunnara parti av oynni. Strandferðslan valdi síðan at taka upp realitetsssamráðingar við Sp/f Suðuroyar Bygdaleiðir um koyring í báðum økjum, og samráðingarnar endaðu við at partarnir undirskrivaðu avtalu fyri koyring í allari oynni, galdandi frá 1.januar 2003 til 1.januar 2008. Sáttmálin ljóðar uppá 4,2 milliónir krónur uttan MVG.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, er væl nøgdur við at tað loksins eydnaðist at fáa koyringina í Suðuroynni í fasta legu. Koyringin hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni varð upprunaliga bjóðað út saman við hinum leiðunum, tá tær vóru bjóðaðar út og tilboð komu inn fyri góðum ári síðan, men síðan hava ymsir trupulleikar stungið seg upp í samband við útbjóðingina í Suðuroynni.

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at tey valdu at taka av tilboðnum frá Sp/f Suðuroyar Bygdaleiðir, tí mett var, at teirra tilboð lá tættast krøvunum í útbjóðingartilfarinum. Í útbjóðingartilfarinum er, umframt prísin, dentur lagdur á dygd og aldur á bussunum, ið ætlanin er at nýta til farleiðirnar, tænastustøði og annars hvønn førleika og hvørjar royndir innan almenna samferðslu, tey hava, ið bjóða seg fram.

### Bara flogleiðin eftir

Nú sáttmáli er undirskrivaður við privatar um koyringina hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni, er bara flogleiðin millum Havnina og flogvøllin eftir at bjóða út. Tá koyringin hjá Bygdaleiðum varð boðin út í fjør, valdi Strandferðslan at bíða við at bjóða flogleiðina út. Og eftir øllum at døma ætlar Strandferðslan at bíða nakað afturat.

– Eg meti, at flogleiðin verður boðin út í summar ella tíðliga í heyst, sigur Reidar Nónfjall. Sjálvur er hann í hesum døgum við at rigga av sum stjóri á Strandferðsluni, og tískil verður tað ikki hann, sum kemur at hava ábyrgdina av eini komandi útbjóðing av farleiðini hjá Bygdaleiðum millum høvuðsstaðin og flogvøllin.

Reidar Nónfjall vísir á, at nú fasta sambandið undir Vestmannasund er veruleiki, heldur hann tað vera skilabest at Strandferðslan ger sær nakrar royndir av, hvat grundarlag er undir flogleiðini, nú koyrandi er vestur í Vágar, áðrenn leiðin verður boðin út. Hetta metir hann vera rættast, bæði fyri Strandferðsluna og fyri tey, ið kundu hugsað sær at bjóða uppá koyringina.

Tá undirsjóvartunnilin varð tikin í nýtslu, fór Strandferðslan undir eina nýggja flogleið millum flogvøllin og Eysturoynna. Henda leið kann roknast sum ein víðkan av leið 400. Reidar Nónfjall sigur, at Strandferðslan hevur gjørt avtalu við tey, ið røkja leið 400, um eisini at taka sær av flogleiðini inn í Eysturoynna.